

# Dagstovnurin Reiðrið søkir starvsfólk

Søkt verður eftir starvsfólki til Dagstovnin Reiðrið á Saltnesi. Vit vænta, at tú hevur viðkomandi útbúgving so sum sjúkrarøktarfrøðingur, námsfrøðingur, fysioterapeutur, ergoterapeutur ella aðrar drúgvar viðkomandi royndir á økinum.

Dagstovnurin Reiðrið er ein dagstovnur fyri fjølbrekað børn undir 18 ár, har møguleiki eisini er fyri umlætting. Endamálið hjá Reiðrinum er at skapa eitt trygt grundarlag fyri børnini, at tey kenna seg væl, verða vird, eru við í sosialari samveru og fáa eitt mennandi tilboð saman við neyðugu venjingunum.

Reiðrið er ein dagstovnur undir Almannastovuni. Á stovninum eru 8 børn.

Starvið verður sett við einum vikuligum tímatali uppá 30 tímar at byrja skjótast tilber.

**Vit ynskja**
Okkara ynski er, at tú ert virkin og nýhugsandi, hevur góð samstarvsevni og arbeiðir sjálvstøðugt við at loysa uppgávurnar í samsvari við endamálið hjá stovninum og teir málsetningar, stovnurin hevur.

**Í tí dagliga arbeiðinum leggur Reiðrið dent á**
- at hava fyrilit til menningina, aldrinum og tørvinum hjá tí einstaka barninum
- at tað er gott samband og tilknýti ímillum tað einstaka barnið og starvsfólkið
- at barnið kennir seg sum ein týdningarmiklan lið í einum sosialum felagsskapi
- at menna samskifti, sjálvhjálp og sjálvsvirði
- tryggleika, umsorgan og nærveru
- virksemi, sum hóskar til aldurin og menningina hjá tí einstaka barninum.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt áhugavert starv, har tú saman við øðrum fakfólki og hjálparfólkum fært møguleika fyri at seta dám á stovnin.

**Meir fæst at vita**
Nærri upplýsingar um starvið fáast við venda sær til Hannu Juul, leiðara, á telefon 447003.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 8. mars 2007 kl. 12.

**Send umsóknina til:**
Almannastovan
Smyrilsvegur 20
Postboks 3096
110 Tórshavn.

almannastovan
www.almannastovan.fo

KREA.FO - TEL 47 80 80

# Bókhalds- og roknskaparfólk

## til P/F Statoil Føroyar

Søkt verður eftir fólki við bókhalds- og roknskaparførleika til støðroknskapardeildina hjá P/F Statoil Føroyar í Tórshavn. Talan er um eitt avloysarastarv í fyribils 6 mánaðir.

Støðroknskapardeildin hevur sum endamál at veita roknskapartilfar til leiðslu og støðleiðarar, umframt at gera umsitingarligar uppgávur fyri støðirnar.

**Starvið**
Arbeiðið fevnir um:
- Alt vanligt bókhaldsarbeiði
- Ymiskar uppgerðir
- At veita hjálp til gerð av roknskapum

**Vit bjóða**
Tann ið settur verður, kemur at vera ein partur av toyminum á støðroknskapardeildini. Vit kunnu bjóða eitt starv í einum dynamiskum og mennandi umhvørvi. Lønin verður ásett sambært avtalu.

**Førleiki**
Vit sóknast eftir einum ágrýtnum starvsfelaga, sum dugir at arbeiða sjálvstøðugt, og sum sær týdningin av at veita eina góða tænastu til teir áhugabólkar, ið eru knýttir at støðroknskapardeildini.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving hava fyrimun.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Boga P. Nielsen roknskaparleiðara fyri Statoil-støðirnar á tlf. 343500.

Umsóknarfreistin er 28. februar.
Umsóknin skal sendast til:

**P/F STATOIL FØROYAR**
Fíggjardeildin
Vestara Bryggja 2
Postboks 3098
FO 110 Tórshavn

Endamálið hjá Statoil Føroyum er at veita brúkarum í Føroyum oljuúrdráttir og aðrar vørur. Hjá Statoil arbeiða um 150 fólk. Vit stremba eftir at veita bestu góðsku og tænastu, eins og umhvørvisábyrgd á øllum økjum er eitt av fremstu málum okkara.

STATOIL


# Móttøka á Tangavirkinum

**Alla komandi viku, lata vit 25% av baðirúmstilhoyr, havaslangum og tilhoyr.**




Tangavirkið sum smiðjan kallast ídag



Smiðjan hjá Argja Palla, umleið 1943

*Í sambandið við at vit hátíðarhalda 75 ára dagin hjá Tangavirkinum, bjóða vit øllum viðskiftafólkum, veitarum og øðrum, hjartaliga vælkomnum til móttøku á Tangavirkinum, fríggjadagin 23. februar millum 14-17.*

- smiðjuarbeiði
- hvs
- hydraulik
- sniðgóðkendir oljutangar
- stálkonstruktiónir

P/F TANGAVIRKIÐ
...tín veitari innan stálarbeiði

FO-900 Vágur · Tlf. 37 30 65 · Fax 37 39 34 · smija@post.olivant.fo